**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Starvsfólk til A2

Á Landssjúkrahúsinum eru 4 tíðaravmarkaði størv sum ljósmóðir og eitt tíðaravmarkað starv sum sjúkrarøktarfrøðingur, leys til setan skjótast til ber fram til 30. apríl 2006.

A2 bleiv í september 2005 løgd saman við ljósmøðraskipanini og umfatar nú viðgongutíð-, føðing og barsilstíð, umframt eina neonatala eind. Deildin er spennandi við nógvun avbjóðingum, tvørfakligum samstarvi, undirvísing og skipaða innleiðsluætlan. Á deildini eru royndir og virknir starvsfelagir.

**Størvini eru hesi:**
- eitt starv á starvsbrøki 0,75, sum ljósmóðir
- eitt starv á starvsbrøki 0,7, sum ljósmóðir
- tvey størv á starvsbrøki 0,5, sum ljósmóðir
- eitt starv á starvsbrøki 0,5 sum sjúkrarøktarfrøðingur

**Løn- og setanarviðurskifti** smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Ljósmøðrafelag Føroya og millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir/sjúkrarøktarfrøðingur
- starvsroyndir innan viðgongu-, føðing og barsilstíð
- fleksibul og positiv
- góð samstarvsevni
- hug til tvørfakligt samstarv

**Meira fæst at vita** um størvini við at venda sær til Anniku Hoydal, virkandi deildarleiðara, telefon 304500, lok. 5301, mail anho@lsh.fo Rannvá D. Christiansen, virkandi ljósmøðrafakligur leiðari, lokal 5303 og Kristinu Poulsen, virkandi sjúkrarøktarfakligur leiðari, lokal 5002.

**Umsóknarfreistin** er 3. februar 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar-og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn** merkt "umsókn til starv" við avrit av prógvum, autorisatión, CV, viðmælum o.t. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

# Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val 18. februar 2006.

Veljast skulu umboð fyri umdømini Skipanes, Søldarfjørður og Glyvrar.

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi í seinasta lagi 4. feb. 2006.

**Nes Sóknar Sjúkrakassi**
FO-620 Runavík

# Avloysari fyri dagrøktara

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir avloysara fyri dagrøktara í farloyvi í eitt ár at byrja tann 1. mars 2006.

**Vit ynskja at tú:**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni
- Ert tolin og vísir umsorgan
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 8 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 40.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.

Arbeiðstíðin er ímillum kl. 7.30-17.15. Lønin er millum FA og FKA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2006.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Leirvíkar Kommuna**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

# Varaleiðari til barnagarðin á Gásamýri

Leirvíkar kommuna søkir eftir varaleiðara til barnagarðin at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðið er 35 tímar um vikuna og umsøkjarin skal hav anámsfrøðiliga útbúgving.

Í barnagarðinum á gásamýri eru 32 børn í aldrinum 3-6 ár og í frítíðaransingini eru 24 børn, sum ganga í 1. og 2. flokki.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006.

Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi **mánadagin 30. janaur 2006.**

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

Tekniski Skúlin Klaksvík

# Lærarar til HT, SIT og Yrkisútbúgvingar

Sóknast verður eftir undirvísarum til lærugreinirnar:

- Handverkslæra innan timbur- og snikkarayrki. Førleiki sveinabræv.
- Stødd-, alis- og evnafrøði á B-, C- og E-stigi. Førleiki, t.d. verkfrøðingur.

Málkunnleiki í føroyskum og enskum er ein fyrimunur.

Lutvís er talan um tvørfakliga undirvísing og samstarv í toymi.

Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið.

Tikið verður við starvinum frá 1. mars ella so skjótt, sum tilber.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum innan 4. februar.

Àhugað kunnu venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20 · 700 Klaksvík

*Tekniski Skúlin í Klaksvík er sjálvognarstovnur og vinnuskúli. À skúlanum eru miðnámsútbúgvingarnar, HT og SIT, og skúlagongd fyri handverkslærlingum innan el-, maskin- og timburyrki.*
*Aðalmál skúlans er, at vera kendur fyri eitt gott skúlaumhvørvi og fakliga og námsfrøðigliga menning*


**BYGDAFELAGIÐ VARÐIN**

**skipar aftur í ár fyri**



**FØROYSKUM DANSI Í BYGDARHÚSINUM Í HÓSVÍK**

**leygarkvøldið 21. januar kl. 22.00**

**Kostnaður 50 kr. íroknað kaffi, te og breyð**

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

**BYGDAFELAGIÐ VARÐIN**